# TILTØK

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 verður samvera við drekkamunni. Kl. 12 verður sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har Árni Joensen úr Oyndarfirði talar.
Sunnukvøldið kl. 18.00 verður sangmøti við góðum felagssangi og luttøku av sangbólkinum SALT úr Eysturoynni.
Mánakvøldið kl. 19.00 verður ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5. - 10. flokk.
www.hebron.fo

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11.00: Møti. Eingin sunnudagsskúli, men *familjutími kl. 17.00.* Øll eru hjartaliga vælkomin. Drekkamunnur aftaná.
Mánadagin kl. 17.00 og 19.00: Skótafundir.

### Meinigheitshúsið
Fríggjakvøldið kl. 19.30–21.30: Juniorhugni, frá 5. flokki.
Leygardagin kl. 9.30–12.00: Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl.18.00: Møti v/ Jóannes Fonsdal.
Mánakvøldið kl. 20.00: Kvinnumøti.

### Frá Ebenezer
Fríggjadag
kl. 17.00 Barnamøti
kl. 20.00 Teen-Night
Leygardagin
kl. 17.00 Barnamøti
Sunnudag
kl. 10.00 Breyðbróting.
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Barna og familjumøti
Øll eru vælkomin.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

### Missiónshúsið við Landavegin
Í dag kl. 16.00: Møti við Jørgen Bernhard og kl. 20.00 møti við Jørgen, Hjørdis, Bernhard og Elsu Jacobsen.
Í morgin kl. 10.00: Bíbliutími við Jørgen Bernhard, kl. 16.00: Møti við Sigurd Sørensen og Poul Kristoffur Joensen, kl. 20.00: Møti við Øssur Kjølbro og Egil Joensen. Ungdómsmøti verður kl. 21.30.

### Filadelfia
*Landavegur 22*
Í dag kl. 20.00: Ungdómsmøti v/ Sam Jakobsen evni er: "Hvussu er Gud"
Í morgin landsbøn kl. 17.00.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ v/ Dánjal á Dul Jacobsen, kl. 11.50: Sunnudagsskúli og ABC v/ Alex O´Campo, evni er: "Myndugleiki hins trúgvandi" 1. partur, kl. 18.00 Møti við kvinnum úr Aglow
Mánadagin kl. 20.00: Bønarskúlin
Heyststevnan 2004 byrjar hósdagin 30. september kl. 19.00 og heldur fram til 3. oktober
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-frí frá 8-16
www.filadelfia.fo

### Lívdin
*Í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 verður evni "Náði - partur 3", talari verður Jógvan Zachariassen og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jens Wang um "Hirðatænastuna - partur 3". Drekkamunnur verður millum møtini. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur er á báðum møtinum. Sunnudagsskúlin er kl. 12.
www.livdin.fo

### Meinigheitin í Hoyvík
*Uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl 20.00: After Eight.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, møti kl. 18.00.
Mánakvøldið kl 20.00: Møti v/ Peter Takczyk.
Mikumorgun kl 07.00: Bøn.
Lega verður við Gjógv í døgunum 01.–03. okt.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Fríggjadag messa kl. 17.30 í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 hámessa v/ Agnello Jacquemin, presti í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.00 til 18.00.

### Kirkju- og missiónshúsið
Sunnukvøldið 26. sept. kl. 19.00: Møti (Gratia).
Hóskvøldið 30. sept. kl. 20.00: Bíbliutími, Gunnar Reynslá, Argir. Opb. 12.

### Filadelfia, Landavegur 22
Heyststevnan 2004 byrjar hósdagin 30. september kl. 19.00
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-frí frá 8-16.
www.filadelfia.fo

### Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

### Saron Vestmanna
Morgunmøti verður sunnudagin klokkan 11.00 við breyðbróting.
Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

### Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli, kl. 19.00: Møti við Regin Høgnesen, trúboðara. 30. sept.–3.okt. er ætlanin at hava vikuskiftismøtir.

### Frá Lívsins Orð, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.
Ungdómsmøti verður mánadagin kl. 20.00.
Øll eru vælkomin.

### Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12.00: Breyðbróting og sunnudagsskúli. Á møtinum kl. 18.00 talar Símun Absalonsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00: AWAKE við Jógvan Zachariassen.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti við Jan Jacobsen. Barnamøti kl.17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

### Missiónshúsið á Skála
Leygarkvøldið 25. september kl. 20.00: Ungdómsmøti við Gudrun Vest, trúboðara. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið Thabor á Toftum
Sunnukvøldið 26. september kl. 18.00: Møti. Gudrun Vest, trúboðari, talar um ytrimissión. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið í Leirvík
Einki møti og ungdómsmøti verða sunnudagin vegna konfirmatiónir.
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími.
Fríggjakvøldið 1. okt. kl. 19.00: Hugnaløta. Øll eru vælkomin.

### Læraranna Missiónsfelag
L.M.F.-stevna verður í Bønhúsinum á Hellunum leygardagin 25. sept.
Skrá: Kl.10.00: Bíbliutími v. Ólavi Magnussen.
Kl. 11.15: Fortelur Gudrun West frá arb. í Tanzania.
Kl. 14.00: Gimmi Olsen sigur frá læraratíð síni í Mali.
Kl. 15.30: Alma Bjartalíð sigur frá, hvussu tað kennist at sita eftir heima.
Kl. 16.30: Jóannis Fonsdal greiðir frá arb. millum gøtubørn í Kiev.
Kl. 19.30: Møti v. Poulu Fonsdal.
Savnað verður inn til L.M.F.-arbeiðið. Ynskist døgverði/náttverði, so sig frá á tlf 444473/444342.
Øll eru hjartaliga væl komin.

### Frá Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum
Vikuskiftismøtir verða 24., 25. og 26. sept.
Árni Kjærbæk úr Vági, og Gullak og Jónhilda úr Tjørnuvík tala og syngja. Ung skipa fyri sangi og drama.
Fríggjadag og leygardag er møti kl. 20.00 og sunnudag kl. 19.00.
Sunnudag 26. sept. verður familjumøti kl.15.00 við Turið og Snorra Brend.

### Missiónshúsið á Viðareiði
Leygarkvøldið 25. september kl. 21.00 verður ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Getsemane Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20.30: Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 13.30: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Møti.

### KFUM&K, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 22.00: Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bønarløta. Kl 18.00: Møti við Kristian Fríðrik Olsen. Kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl.18.00: Møti v/ familjuni Poul Marner Justesen.

### Evangelisk møti í Samljóð í Skopun
Leygarkvøldið kl. 20.00: Stórt sangmøti við luttøku úr Sandoynni og norðanfjørðs. Aftaná verður drekkamuður.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti við luttøku úr Betania, eisini syngja Herman og Gigga. Tórmund og fleiri.

### Sands missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli.
Onki møti. Farið verður til Skálavíkar, har Nils Jacob Nielsen talar. Tú ert vælkomin.

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl.17.30: Bøn- & lovsangsløta, kl. 18.00: Møti v/ Thomas Juul Askham. Innsavnan. Sangluttøka við Torbjørn Láadal og Steindor Hjaltalin.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Skálavík
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 18.00: Møti við Niels Jacob Nielsen, trúboara.
Missiónsvikan verður 18.–21. november.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Møti verður fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.00.
Sunnudagsskúlin verður sunnudagin kl. 14.00.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00.
Innsavnan verður fríggjakvøldið og sunnukvøldið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Suðuroyingar
Í hesum døgum vitjar Helgi Hróbjartson, prestur og trúboðari, oynna.
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið verða møtir í missiónshúsinum á Tvøroyri kl. 20.00.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 í missiónshúsinum á Tvøroyri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin 26. sept. kl. 18.00: Evangeliskt møti. Eddie Bech talar.

### Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

### Føroyahúsið, Keypmannahavn
Fríggjakvøldið 24. sept. kl 20.30 hevur Kristnastova fríggjakvøldsmøti í Føroyahúsinum. Andrew Berghamar talar. Vitnisburður. Nógvur góður og léttur felagssangur við sera góðum tónleikarum og sangarum. Ókeypis te/kaffi og kakir. Øll eru hjartaliga vælkomin.
NB.:Hetta kvøldið er einki fríggjakvøldsmøti í Kristnastovu á Birmavej 36, Amager.

### Kristnastova
Fríggjakvøldið 24. sept. er fríggjakvøldsmøti ikki í Kristnastovu, men í staðin í Føroyahúsinum kl. 20.30.

### Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

### Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

### Eliaskirkjan
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

### Pensionistafelagið í Havn
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 29. september kl. 19.00. Thorolf Bjørklund sigur frá.

### Felagið Tórshavn
***Gongutúrur***
Sunnudagin 26. sept. verður gongutúrur: Tyril–Kambsdalur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og drekkamunn við. Tilmelding.

### Tilhaldið
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn miku- og fríggjadag frá kl. 10.-13.30 v/ Anne Grete Harlou, tilm. tlf. 316491**
*Fríggjadagin 24. september*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

### Sunda pensionistafelag
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka. Mánakvøldið 4. oktober kl.19.00. Bussarnir koyra sum vanligt.
Nevndin

### Tilhaldið Hugnin í Sandoy
Opið er frá kl. 14.00-17.00.
Drekkamuður er at fáa.
Bløðini eru til taks.
*Mánadagin 22. sept.*
Vit spæla boccia í Virkinum.
Byrjað verður við løttum fimleiki kl. 14. Síðani spæla reyða og bláa liðið móti hvør øðrum.

### Daghilhaldið Fløvi
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Týsdagin 21. september*
Fimleikur við Jóhannu Trost
*Mikudagin 22. september:*
Felagssangur og spurnarkapping.
*Hósdagin 23. september:*
Fyrireiking til myndaveving
*Fríggjadagin 24. september:*
Vit vitja gamla prestagarðin á Nesi. Kostnaður 20,- Vit møtast í Fløvanum kl. 14 og fylla bilarnar.

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

### Eldrafelagið Kumlá á Skála
hevur hugnaløtu í húsum felagsins týsdagin 21. kl. 19. Jensina Simonsen og Maria Jacobsen siga frá teirra arbeiði í dagtilhaldinum Fløvin, Runavík. Øll eru vælkomin. Nýggir limir kunnu tekna seg.

### Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

### Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

## SILVURBRÚDLEYP
Týsdagin 19. oktober hava Amanda og Andreas Max Andreasen, Tórshavn, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum leygardagin 16. oktober kl. 19. Skyldfólk, vinir og kenningar ið vilja gleða silvurparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 316620, 213816 ella til postadr. amanda-a@post.olivant.fo áðrenn leygardagin 2. oktober.

## BRÚDLEYP
25. september giftast Dóra Dagbjartsdóttir Johansen og Jan Gaard Joensen, bæði úr Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00 og veitsla fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.



ÚF

*Leygardagur kl. 19.05:*
### Leygarkvøld í Atlantis
Leygarkvøldsgestur í Atlantis í Klaksvík hesaferð verður Minna á Hædd, sum vit eitt nú kenna frá Gekkinum.
Á pallinum verður somuleiðis Eliesar í Pállstovu Joensen, sum hevur spælt sjónleik og verið partur av eitt nú Norðoyastevnuteitinum í nógv ár. Við hann verður eisini tosað um skemt sum fyribrigdi, íblástur og fyrimyndir.
Á musikcaféini vitjar Arnfríð Lützen, og onki undirhaldskvøld úr Atlantis uttan áskoðarar og orkestur. Orkestrið verður mannað av Magna Husgaard, Mikkjali Hvannastein, Eyðuni Nolsøe og Jens Paula Joensen. Vertur verður Gunnar Nolsøe.
Atgongumerki fáast á Shellstøðini í Klaksvík og undan filmsýningunum í Atlantis.

*Mánadagur kl. 15.03*
### Nón
Í fyrstu beinleiðis Nón sendingini í vetur verður Kemm Poulsen í Havn gestur. Kemm er kendur fyri at vera léttur og prátingarsamur. Í dag koyrir hann býruvogn, men hann hevur roynt eitt sindur av hvørjum. Upprunaliga er Kemm radiomekanikari, men hann hevur eisini verið til skips og havt ymiskt sjálvstøðugt fyritakssemi. Kemm Poulsen var ein undangongumaður, tá hann í 80unum stovnaði fyritøku, ið framleiddi sjónbandalýsingar. Nón er klokkan trý seinnapartin við práti, tónleiki og Landastroki.

*Mánadagur kl. 17.05*
### Viðurgerði
Tríggjar dagar í vikuni klokkan 17.05 fer útvarpið nú at hava sendingar av bygd. Lagt verðir fyri mánadag við sending úr Suðuroynni, sum Suðurrás skipar fyri. Týsdag verður sendingin Heimabeiti úr Norðoyggjum, sum verður send úr Studio Pegasus, og hósdag verður ein nýggj sending á skránni. Hon verður úr Eysturoynni. Tað er eisini Studio Pegasus, sum framleiðir hana til útvarpið.

*Mánadagur kl. 19.00*
### Tá menn kappaðust naknir
Grikski rithøvundurin Lukien, sum livdi í fyrstu øld eftir Kristi føðing, gevur eina mynd av teimum gomlu olympisku leikunum. Tað ger hann við at orða eina samrøðu millum ein fremmandan ferðamann og sjálvan Solon, sum var ein av teimum sjey vísu í Arhen. Tað er týðuligt, at tann fremmandi heldur ikki nógv av tí, sum hann hevur sæð. Hinvegin sigur Solon, at hóast kappingarnar tykjastas vandamiklar og ógvusligar, hava tær stóran týdning fyri likam og sál.

*Hósdagur kl. 19.00*
### Tilvera: Krígsbarn
Samrøða við Britt Rasmussen. Pápi hennara var bretskur hermaður, og hetta var ofta kastað henni fyri, tá hon var barn.
Fyri nøkrum árum síðani fór hon at leita eftir pápa sínum. Tá ein tíð var frálíðin fekk hon samband við familjuna í Onglandi, sum tók væl ímóti henni.




**Vika 39 – 22. sept.**
Vinnaratøl: **01 - 15 - 18 - 34 - 34 - 43 - 46**
Eykatøl: **28 - 47**
Supertal hesa vikuna: **02**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **1.967.831,- kr** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **92.950,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **4.159,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **125,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **39,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## GJALDOYRAKURSIR

| *Gjaldoyrakursir ásettir av danska Tjóðbankanum* | | **22.09.04** | **Ultimo aug. 2004** |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 607,4200 | 614,1500 |
| Bretland | **Pund** | 1088,2900 | 1101,1100 |
| Svøríki | **Króna** | 82,1500 | 81,5000 |
| Noreg | **Króna** | 88,6100 | 88,5400 |
| Sveits | **Frankur** | 480,5800 | 482,1100 |
| Ísland | **Króna** | 8,5000 | 8,4900 |
| Kanada | **Dollari** | 472,1300 | 466,1000 |
| Japan | **Yen** | 5,4945 | 5,5904 |
| | **Evra** | 743,7900 | 743,8000 |

FØROYA SPARIKASSI

## KROSSORÐ



**Vinnari:**
*Marianna Gullaksen*
*Bøgøta 17*
*410 Kollafirði*

### Loysnin frá seinastu viku
### Loysunarorðið: JAVNSINTUR



### Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.
Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn –og viðmerkið »Krossorðagáta nr. .«á bjálvan.

389

**Loysunarorðið:** ..................
Navn: ........................
Bústaður: ......................
Bygd/býur: ......................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***